# Børnini syngja páskini inn

**Kunoy:** Aftur í ár verður skipað fyri serstakari barnasangløtu í Kunoyar kirkju skíriskvøld.

Í fjør varð ein líknandi gudstænasta hildin og var undirtøkan sera góð.

– Kirkjan var fullsett, og vóna vit, at aftur í ár verður líka góða undirtøka, siga stigtakararnir til hetta tiltakið.

Í ár verður tað barnaráðgevin hjá Heimamissiónin Marjon Poulsen sum kemur at luttaka. Til eina slíka gudstænastu hoyrir nógvur sangur, eins og ung úr Vágum fara at framføra eitt dramastykki.

Sangløtan, sum byrjar kl. 19:30 er fyri allar aldursbólkar.

**sb.**



*Kunoyar kirkja verður aftur í ár karmur um serstaka barnagudstænastu á páskum*

# Nógv á skránni tá tunnilin letur upp

**Klaksvík:** Í dag er júst ein mánaður til Norðoyatunnilin letur upp. Hetta er ein hending sum ikki fer aftur við borðinum uttan markering.

Ætlanin er at hava nógv tiltøk á skránni sjálvan upplatingardagin 29. apríl. Men bæði undan og aftaná verða fleiri tiltøk sum fara at seta veruligt fokus á býin og tað hann hevur at bjóða innan allar mentanargreinir.

Til tess at samskipa alt hetta eru settir tveir samskiparar – Steintór Rasmussen og Dávur Winther – og kunnu teir longu nú boða frá teimum fyrstu spennandi tiltøkunum á heimasíðuni hjá Klaksvíkar kommunu.

Einki kann tó takast frá sjálvum hátíðarhaldinum, tá koyrandi verður á fyrsta sinni undir Leirvíksfjørð. Her eru nógv ting longu komin á skránna.

Hesa løtuna verða bæði tónleikur, kórsangur, røður og snóraklipping. Røðarar verða stjórin í Norðoyatunlinum, Dávur Reinert Hansen; løgmaður Jóannes Eidesgaard; borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen; landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm og nevndarformaðurin í Norðoyatunlinum Bergur í Garði.

Tónleikur verður eisini á skránni. Millum annað fer serstaka Tunnilskórið undir leiðslu av Meinhardi Bjartalíð at syngja. Klaksvíkar Hornorkestur fer at spæla, m.a. "Tunnils-Marsjin" eftir Goff Richards.

Aftaná hetta fer vinnumálaráðharrin at klippa tann gylta snórin, og so verður koyrandi millum Klaksvík og Leirvík og øvugt.

**sb.**



*Nógv er á skránni, tá Norðoyatunnilin letur upp*



*Havnatindur liggur tungt í sjónum: Spurningurin er, um/nær báturin kann fara aftur í drift*

# Lá sokkin við bryggju

**Útróðrarbáturin "Havnatindur" fer ikki til fiskiskap aftur í bræði. Fyrrapartin í dag lá hann meiri undir enn omanfyri sjóvarmálan.**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Um 9-tíðina í gjárkvøldið fekk sløkkiliðið í Klaksvík boð um at koma oman á vestaru bryggjuna.

Hetta hendi eftir fráboðan frá einum persóni sum hevði gingið har framvið. Hesin hevði lagt merki til, at olja lak úr Havnatindi, sum lá við bryggju.

Teir úr sløkkiliðinum vóru skjótir á staðið. Hóast tað regnaði nakað illa, gekk lættliga at fáa lagt út oljusperruna rundan um bátin.

– Vit løgdu hesa sperruna út, fyri at forða fyri at umhvørvið varð dálkað av oljuni.

– Hetta arbeiðið gekk bæði skjótt og væl, sigur Finn Hansen, leiðari hjá sløkkiliðinum.

Í regninum og vindinum fyrrapartin í morgun vóru menn frá IRF í ferð við at súgva upp sum mest av oljuni innanfyri sperruna.

Tað er spf. Sjómentir sum sambært Skipalistan 2006 eigur Havnatind. Talan er um ein útróðrarbát, sum er smíðaður úr furu og eik í Klaksvík fyri skjótt 60 árum síðani.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á útgerðarmanni Havnatinds, Olavi Waag Høgnesen í Klaksvík, áðrenn blaðið fór til prentingar á middegi í dag.

# Stór stevna um missión

**Í døgunum 8. til 10. september verður stevna um útimissión í leguhúsinum í Nesvík, har høvið verður at fáa meiri at vita um, hvat missión er og hvussu ein kristin er partur av hesum. Heimamissiónin skipar fyri**

STEVNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nesvík:** – Ætlanin við stevnuni er at kveikja áhuga og kalla til missión á øllum økjum í kirkjuligum samanhangi, siga fyrireikararnir.

Á stevnuni hetta vikuskiftið verður eisini kunnað um teir ymsu møguleikarnar og avleiðingarnar av at fylgja kallinum at fara út sum trúboðarar.

– Missiónsboðini umfata øll trúgvandi og tí vera tiltøk fyri allar aldursbólkar, ung sum gomul. Komið verður inn á viðurskifti frá veruleikanum, bæði áðrenn, meðan og eftir at trúboðarar hava verið úti í tænastu, sigur fyrireikingarnevndin til stevnuna.

Við á stevnuni verða nógvir núverandi og fyrrverandi trúboðarar, umframt onnur, ið hava stytt roynd innan missión og hava stuðlað undir virksemið ígjøgnum nógv ár.

Stevnan fer at hava nógv at bjóða uppá til allar aldursbólkar.

Har verður undirvísing, møti, áhugatímar, pallborðsorðaskifti, kunning missiónsskúlar og felagsskapir, workshops og leikir.

Fleiri framsýningar verða eisini, m.a. mentanarsýningar við mati, klæðum og ymsum frá gerandisdegnum í fremmandum londum og mangt annað.